## DAGSINS MEINING

# Eitt sera gott tiltak

Um vikuskifti var Sundalagstevna í Kollafirði. Millum tey mongu tiltøkini var opið hús á Búnaðadeplinum, har familjur við børnum kundu síggja alskyns dýr. Tiltakið var sera væleyndað og heilt nógv fólk nýttu høvið at vitja Búnaðardeplini. Her kundu børn sleppa ein túr á rossabaki, her sást, hvussu ein høsnarungu kemur úr egginum, her var alt slag av flogfenaði við ungum. Her vóru neyt og ross, seyður og hundar, kaninir, gomul føroysk neyt og gomul føroysk ross.

Tað verður gjørt alt ov lítið fyri, at børn í býnum skulu kenna til tað veruliga lívið. Børn í Havn veksa upp uttan at hava sæð øll tey dýr, ið áður vóru heilt vanlig í Føroyum. Tað er sunt fyri børn at vera nær við dýr og hartil børn hava mikið frægd av at vera saman við dýrum. Tað er tí alla æru ert, at kollfirðingar skipa fyri dýradegi á búnaðardeplinum. Undirtøkan var ómetaliga stór og bilrøðinar vóru langar. Vónandi skulu vit ikki bíða eitt heilt ár, til høvið hjá eitt nú Havnarbørnum aftur verður at síggja øll hesi dýrini.

Ein annar spurningur er, um ikki ein kommuna sum Havnar kommuna, ið er sera vælrikin og fíggjarliga sera sterk, átti at havt eitt ella annað tiboð, har tað var møguligt hjá smábørnum saman við pedagogum ella foreldrum at verið saman við dýrum. Hetta vildi havt sera stóran mentalhygieinskan týdning. Tað nýtist ikki at vera ein altjóða zoologiskur garður, men heldur eitt stað, har børn undir tryggum umstøðum kundu sloppið at spælt við dýr og samstundis kundu lært nakað um náttúrna.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Vit mugu mótmæla fangaflutninginum

**Tað er nú staðfest, at USA ólógliga hevur rænt fólk og flutt tey í fongsul eystanfyri at verða pínd. Nógv bendir á, føroyska loftrúmið hevur verið nýtt til hesar brotsgerðir ímóti mannarættindunum. Hesum eiga føroyskir myndugleikar at mótmæla.**

JOHN JOHANNESSEN
Løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin
www.john.fo



Eiga vit at tiga og samtykkja, tá føroyskt loftrúm verður brúkt sum liður í brotum á grundleggjandi mannarættindi, ið ST hevur samtykt?

Mítt svar er nei. Og tí havi eg sum einasti samgongulimur í uttanlandsnevndini boðað løgmansskrivstovuni frá, at vit eiga at gera vart við, at føroyingar ikki góðtaka ólógligan fangaflutning í føroyskum loftrúmi.

### Evroparáðið staðfest illgruna

Mikudagin staðfesti ein kanning hjá Evroparáðnum, at amerikanska fregnartænastan hevur rænt fólk í Evropa og flutt tey til loyniligg fongsul í Eysturevropa og Miðeystri, har tey síðani eru pínd.

Hendan mannarænig er farin fram við loyniligum flogførum, ið síðani 2001 hava flogið meira enn túsund ferðir í evropeiskum loftrúmi á loyniligum ferðum. Nógv bendir á, at slíkt eisini er farið fram í føroyskum loftrúmi, hóast danskir myndugleikar ikki hava viljað svarað Evroparáðnum uppá hendan fyrispurning.

Tó er staðfest, at eitt av CIA flogførunum við frámerkinum N379P fleyg í donskum øki (møguliga føroyskum) bert fýra dagar áðrenn CIA í 2002 nýtti flogfarið til at ræna tveir egyptar í Svøríki og flyta teir aftur til Egyptalands, har teir vórðu píndir.

### Á føroyskum borði

Nøkur av hesum viðurskiftum hava verið viðgjørd á føroyskum borði. Millum annað, tá løgmaður 26. januar í ár setti seg í samband við uttanlandsnevndina til at fáa ráðførslu um, hvørt hann skuldi viðmæla, at danskir myndugleikar játtaðu USA hernaðarligt flúgviloyvi at flúgva ígjøgnum føroyskt loftrúm við vandamiklum farmi og øðrum í sambandi við uppbyggingina av Irak.

Tá hendan ráðførslan fór fram, var illgruni longu reistur um ólógliga fangaflutningin hjá USA. Tí valdi eg sum limur í uttanlandsnevndini at taka orðini í Fámjinsskjalinum um "ægte medinddragelse og medindflydelse" á uttanríkispolitiska økinum í álvara. Eg mælti nevndini til at biðja um eina frágreiðing um møguligan fangaflutning í føroyskum loftrúmi. Hendan umbøn varð havnað av meirilutanum í nevndini tann 15. februar í ár. Tí valdi eg í staðin at senda mítt egna svar til ráðførsluna, har eg millum annað skrivaði soleiðis:

*"Í øðrum lagi er mín støða, at vit í svari til fyrispurningin um at geva USA hernaðarligt flúgviloyvi í føroyskum loftrúmi senda ein greiðan politiskan boðskap um, at vit ikki góðtaka, at føroyskt loftrúm verður nýtt sum liður í ólógligari pínslu av fangum. Tað er jú beinleiðis í stríð við fólkarættin at flyta ein persón til eitt land, har vandi er fyri, at viðkomandi verður píndur.*

*Eftir míni fatan er tað okkara skylda at gera vart við hesi viðurskifti. Um vit tiga og samtykkja, er stórur vandi fyri at vit eru óbeinleiðis við til at ganga ímóti rættinum hjá hvørjum einstakum menniskja".*

Á fundi við Stig Møller 29. mars í ár var danski uttanríkisráðharrin í Føroyum, har hann millum annað var á árliga fundi sínum við uttanlandsnevnd løgtingsins. Her gjørdi eg aftur vart við míni sjónarmið og spurdi beinleiðis uttanríkisráðharran, um hann kundi vátta ella avsanna, at slíkur flutningur fór fram í føroyskum loftrúmi.

Svarið frá Per Stig Møller var, at hann visti ikki um, at slíkt var farið fram. At danska uttanríkisráðið ikki hevði nakrar upplýsingar um hetta. At Danmark ikki ráddi yvir nøkrum loyniligum fongslum. Og nógv meira enn hetta vildi hann ikki siga um málið. Kortini vísti hann til, at Evroparáðið var farið í gongd við eina kanning av hesum viðurskiftum.

Nú er kanningin liðug, og illgrunin er bara enn meira staðfestur.

### Virða vit mannarættindi?

Sitandi samgonga hevur eitt greitt mál at styrkja um uttanríkispolitiska leiklutin. Millum annað tí varð stór orka løgd í at fáa Fámjinsskjalið til høldar. Tað er í hesari avtalu ímillum danir og føroyingar, at tað eftir føroyskum ynski er staðfest, at Føroyar skulu hava "ægte medinddragelse og medindflydelse" á uttanríkispolitikkin.

Nú liggur á okkum at taka hesi orðini í álvara og brúka Fámjinsskjalið til at ávirka okkara viðurskifti á uttanríkispolitiska økinum.

Í hesum serstaka málinum eiga vit at seta okkum spurningin, um stríðið ímóti terrorismu er orsøk til at seta til síðis mannarættindini og tey grundleggjandi virði, ið okkara vesturlendska samfelag er bygt á.

Mítt svar er nei, nei og aftur nei. Tí gera vit tað, hevur terrorisman vunnið.

Tískil eiga føroyskir myndugleikar í fyrsta lagi at krevja at fáa at vita, hvørt føroyskt loftrúm verður brúkt til ólógliga røning av fólki. Og í øðrum lagi eiga vit at mótmæla hesum og vísa í verki, at Føroyar og føroyingar virða mannarættindasáttmálan hjá ST og ynskja, at hann verður fylgdur.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán. kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.